Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Kárason Petersen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Føroyskur limaskapur í IOC

Spurningar:

1. Er gongd í málinum um at tryggja Føroyum limaskap í altjóða olymisku nevndini (IOC)?
2. Lúka Føroyar formligu treytirnar fyri limaskapi í altjóða olympisku nevndini?
3. Um ikki, hvør er forðingin fyri, at Føroyar kunnu gerast limur í altjóða olympisku nevndini?
4. Nær kunnu vit vænta, at Føroyar kunnu luttaka á olympisku leikunum?

Viðmerkingar:
Fyri at føroysk ítróttafólk kunnu luttaka á olympisku leikunum, umboðandi Føroyar undir føroyskum flaggi, mugu Føroyar fáa limaskap í altjóða olympisku nevndini.

Føroyar hava síðani 1984, tá ið fyrsta umsóknin varð latin inn, strembað eftir at fingið sjálvstøðugan limaskap í altjóða olympisku nevndini, Skiftandi samgongur hava arbeitt við málinum, tó uttan, at tað er borið á mál.

Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu stendur, at samgongan vil stuðla føroyskum limaskapi í millumtjóða ítróttafelagsskapum eins og luttøku í millumtjóða kappingum, og at arbeitt verður framhaldandi fyri føroyskum limaskapi í IOC.

Tí verður spurningurin settur.

Á Løgtingi, 20. apríl 2022

Bjarni Kárason Petersen